# Varmakeldu hýrurin funnin í Vestmanna



*Glaðar fuglfjarðarkvinnur umborð á Erlu Kongsdóttir eftir sgurin á Fjarðastevnu*

Mynd: Jens Kristian Vang

**5-MANNAFØR KVINNUR** Tað, sum meiri enn hálvkiksaði hjá fulgfirðingum í fótbólti á Varmakeldustevnu, eydnaðist til fulnar við Erlu Kongsdóttir á Fjarðastevnu

Tróndur Arge

Annað hvørt ár er tað FM kapp-róður á Varmakeldustevnu í Fuglafirði. Í vikuskiftinum var Varmakeldustevna í Fuglafirði, men hesa ferð var eingin kapp-róður á skránni.

Álitið í ítróttinum fyri við góðum avriki á stevnuni at syrgja fyri góðum stevnuhýri í Fuglafirði varð lagt á besta fótbóltsliðið hjá ÍF. Leingi sá tað út til, at tað skuldi eydnast, men í síðstu løtu meiri enn hálvkiksaði tað.

Erla Kongsdóttir við kvinnu-manning var ikki á stevnu í Fuglafirði fyrrenn út á kvøldið. Tá ið grøni báturin við væl trimmaðu manningini kom inn um Dalarnar í bili, varð stevnu-hýrurin lyftur upp.

Kvinnurnar á Erlu Kongs-dóttir høvdu verið á aðrari stevnu – í Vestmanna – og vunnið gull og harvið styrkt um vánirnar fyri, at tað skal eydnast fuglfirðingum at vinna FM í kappingini millum 5-mannafør við kvinnum.

Fimm bátar luttóku í hesi kappingini. Havfrúgvin og Blikur kappaðust um at sleppa undan aftasta plássinum. Ta kappingina vann Havfrúgvin við einari bátslongd.

Í hinum endanum vóru tríggir bátar við í kappingini um sigurin. Bæði Drekin og Firvaldur bjóðaðu seg fram beinanvegin, og leingi var tað tætt og spennandi.

Men í endaspurtinum var einki at rafla um. Erla Kongs-dóttir tók seg stútt og støðugt frá kappingarneytunum, og tá ið grøni bátuin fór um málið, var hann meiri enn hálva báts-longd frammanfyri Firvald, sum var skutin frammanfyri Drekan.

Erla Kongsdóttir er fimm stig frammanfyri Drekan, sum er næstfremstur í FM kappingini, og tí ber illa til at ímynda sær annað, enn at Erla Kongsdóttir á Ólavsøku fer at taka ímóti FM steypinum, hóast sigurin hesa ferð ikki var eins sannførandi, sum hann hevur verið tær seinastu ferðirnar.

trondur@sosialurin.fo

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Erla Kongsdóttir | 05:06.20 |
| 2 | Firvaldur | 05:08.22 |
| 3 | Drekin | 05:09.02 |
| 4 | Havfrúgvin | 05:20.11 |
| 5 | Blikur | 05:23.01 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Erla Kongsdóttir | 34 |
| 2 | Drekin | 29 |
| 3 | Firvaldur | 26 |
| 4 | Blikur | 20 |
| 5 | Havfrúgvin | 16 |



*Hóast nær við, so var Páll Fangi eiheldur til at fanga hesuferð*

Mynd: Jens Kristian Vang

# Tað er nær við og næstan hjá suðuroyingunum

**6-MANNAFØR MENN** Hóast hóttanin tóktist vera stór ta fyrstu løtuna, so var eingin ivi, tá ið klaksvíkingur spurtaðu og vunnu á bæði tvøramonnum og vágbingum

Tróndur Arge

Nú hava 6-mannaførini við monn-um kappast fimm ferðir, og eisini í fimtu kappingini var tað Páll Fangi úr Klaksvík, sum fór fyrstur um málið.

Um tíðirnar verða nýttar sum grundarlag, so ber ikki til at siga, at talan hevur verið um serliga sannførandi sigrar. Tvørabáturin (3 ferðir), Smyril og Riddarin hava verið fremstu avbjóðararnir, og tað hevur hvørja ferð verið tætt og har-við spennandi.

Tvær tær fyrstu ferðirnar var munurin eitt stórt sekund, og tríggjar tær seinastu ferðirnar hevur munurin verið minni enn eitt sekund. Í Vestmanna endaði tað, sum tað plagar. Fram ímóti mál-inum hefti einki fyri Páll Fanga.

Fyrri parturin av róðrarteininum myndaðist soleiðis, at tað kundi boðað frá stórum spenningi. Smyril legði seg á odda, og Tvørabáturin og Riddarin høvdu eisini góðan hug at blanda seg uppí.

Smyril var tað mesta av einari bátslongd á odda, áðrenn Páll Fangi tók dyk á seg. Men tá ið klaks-víkingar høvdu tikið sær um reiggj, var lítil og eingin ivi.

Tvørabáturin vísti seg at vera drúgvasti kappingarneytin, men á málinum var eingin ivi. Páll Fangi var fyrstur á mál, og nú er lítil ella rættari eingin ivi um, at tað verður Páll Fangi, sum verður meistari.

At Tvørabáturin var næstfyrstur hesa ferð ber við sær, at hann er favorittur at vinna silvur í FM kappingini. Avrikið í Vestmanna bendi á, at Tvørabáturin kann hava ein møguleika at vinna á Vestan-stevnu og á Ólavsøku, men at FM heitið er á veg til Klaksvíkar er tað neyvan nakar ella rættari eingin ivi um.

trondur@sosialurin.fo

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Páll Fangi | 04:37.04 |
| 2 | Tvørabáturin | 04:38.03 |
| 3 | Smyril | 04:40.08 |
| 4 | Riddarin | 04:40.21 |
| 5 | Strálan | 04:45.21 |
| 6 | Skúgvur | 04:53.24 |
| 7 | Hósvíkingur | 04:55.09 |
| 8 | Jarnbardur | 04:56.14 |
| 9 | Fortuna | 05:00.16 |
| 10 | Kollfirðingur | 05:02.24 |
| 11 | Sølmundur | 05:04.18 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Páll Fangi | 35 |
| 2 | Tvørabáturin | 28 |
| 3 | Riddarin | 24 |
| 4 | Smyril | 22 |
| 5 | Strálan | 15 |
| 6 | Skúgvur | 11 |
| 7 | Hósvíkingur | 4 |
| 8 | Lómur | 1 |